# Brandur við nýggjum tilfari í Miðlahúsinum



Hóskvøldið verður konsert í Miðlahúsinum við Brandi Enni. Brandur og góð manning fara at framføra nýggj løg, so høvi verður at hoyra, hvat Brandur arbeiðir við fram til framførsluna á Summarfestivalinum og útgávu í heyst. Brandur Enni er summargestur í Føroyum. Gerandisdagur hansara er í Svøríki, har hann gongur á tónleikaskúla, og gerandisdagurin er annars eisini merktur av luttøku í filmsætlan, sum fyri stuttum førdi Brand til Hawaii. Men Brandur liggur ikki á løtu síðuni, nú hann vitjar í Føroyum. Hann arbeiðir við nýggjum tilfari, sum verður at hoyra á Summarfestivalinuum og á fløgu seinni í ár. Men fyri at royna nýggja tilfarið á palli, og fyri at nøkta spæligleðina, verður konsert í Miðlahúsinum hóskvøldið. Brandur fer á pall við góðari manning og nýggja tilfarinum, og sum skilst, er talan um stílbroyting. Manningin hóskvøldið verður Brandur Enni, guitar og sang, Tróndur Enni, bass og sang, Benjamin Petersen, guitar, Leivur Samuelsen, trummur, Bjarni Lisberg, klaver og Heiðrun Petersen, fiól. Konsertin í Miðlahúsinum hóskvøldið byrjar klokkan 20.

# Búskapurin er glóðheitur

**- Reyðu lampurnar lýsa. Búskapurin gløðir og vit mugu tálma. Fyri meg hevur tað t.d. onki at siga, hvussu Sandoyartunnilin verður fíggjaður, tí tað ávirkar búskapin undir øllum umstøðum, sigur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum Magni Laksafoss, nú eitt upprit frá Landsverk hevur varpað ljós á ymsar hættir at fíggja Sandoyartunnilin. Fíggingarmynstrini hevur hann stutt sagt onga viðmerking til**



*- Tað er eitt gott boð, at vit útseta ætlanina um Sandoyartunnilin, men tað kann eisini vera okkurt annað, sum bíðar. Tað snýr seg um at tálma, tí búskapurin er glóðheitur og reyðu lampurnar lýsa, sigur Magni Laksafoss*

TUNNLAR

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Magni Laksafoss er avgjørdur, tá hann verður spurdur um uppritið frá Landsverk, har tað verður sagt, at ymsik fíggingarmynstur kunnu nýtast í samband við Sandoyartunnilin. T.d. kunnu Eysturoyartunnilin og Sandoyartunnilin leggjast saman í almentpartafelag, so vinningurin av Eysturoyartunnlinum kann fíggja Sandoyartunnilin. Soleiðis slepst eisini undan, at peningur skal játtast á fíggjarlógini.

### Onga viðmerking

Uppritið hevur fingið tingmenn og onnur at rakna við. Summi eru fyri, meðan onnur meta, at hesar hugsanir steðga ella útseta ætlanirnar um ein sandoyartunnil.

Men landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Magni Laksafoss, er konsekvetnur, tá hann svarar spurninginum um fíggingarmynstrini, sum Landsverk varpar ljós á.

- Onga viðmerking, sigur Magni Laksafoss avgjørdur.

- Mítt fokus er avgjørt á, at vit mugu tálma búskapinum. Og fíggingarmynstrini hava fyri mær ongan áhuga júst nú. Tað snýr seg um at tálma, tí búskapurin er glóðheitur og reyðu lampurnar lýsa, sigur Magni Laksafoss.

- Tað er eitt gott boð, at vit útseta ætlanina um Sandoyartunnilin, men tað kann eisini vera okkurt annað, sum bíðar. Men hendan ætlanin er ein stór ætlan, sum eg meti kann bíða, sigur Magni Laksafoss, ið leggur dent á, at tað snøgt sagt snýr seg um virksemið í samfelagnum og um, hvussu nógv kann vera í gongd samstundis.

- At útseta Sandoyartunnilin er ikki nokk í sær sjálvum, men ætlanin kann bíða og fyllir nógv í búskapinum. Tí hevur slík ætlan eisini tær avleiðingar, at annað hvørvur í búskapinum, sigur Magni Laksafoss.

### Tunnil og fiskimannafrádráttur

- Búskapurin er glóðheitur og vit mugu tálma í 2008, tí vit kunnu ikki halda fram á henda hátt. Tað er eitt sindur avhasað í londunum kring okkum, men í Føroyum eru vit óivað eitt sindur seinkað í so máta, sigur Magni Laksafoss.

- Fyri meg hevur tað ikki so stóran týdning, um tað er tunnilin til Sandoynna sum bíðar, ella um vit minka fiskimannafrádráttin, men vit mugu í hvussu er gera okkurt, staðfestir landsstýrismaðurin í fíggjatmálum.

- Eg kann ikki koma og siga, at vit skulu tálma, uttan at koma við onkrum ítøkiligum, og tí havi eg sagt, at míni boð eru, at vit útseta Sandoyartunnilin og minka fiskimannafrádráttin. Tað er nú einaferð so, at 90% av eini fíggjalóg liggja føst og so eru tað 10%, sum ein kann gera nakað við. Tí er spælirúmið ikki so stórt og tí er t.d. ætlanin um Sandoyartunnilin eitt gott boð uppá eina stóra ætlan, sum kann bíða, sigur Magni Laksafoss.

### Boðskapurin við at siva inn

At Landsverk í uppriti hevur varpað ljós á, at til ber fíggja tunnilsætlaniruttanum landskassan, hevur ikki áhuga landsstýrismansins. Fyri Magna Laksafoss snýr tað seg um, at nú skal búskapurin tálmast og okkurt skal bíða og hanasra boð er Sandoyartunnilin, og so kann fiskimannafrádrátturin eisini minkast.

Men trýr Magni Laksafoss uppá, at tingmenn fara at lurta eftir ávaringunum, nú vit eru í einum valári og tað ikki er óvanligt, at tingmenn gjara meira út enn vanligt?

- Eg haldi boðrskapurin er við at siva inn hjá politikarunum. Vit mugu tálma búskapinum og búskapurin tekur ikki hædd fyri, um vit eru í einum valári, ella ikki, sigur Magni Laksafoss.

# Landsverk skal halda seg frá politikkinum

**Eysturoyartingmaðurin Bill Justinussen heldur, at Landsverk við uppritinum um fígginarmynstur í samband við tunnlar, hevur blandað seg í politikkin. Landsverk skal ikki koyra grús í maskinuna, sigur Bill Justinussen**

TUNNLAR

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

- Eg skilji als ikki, at Landsverk, sum skal gera ymiskt tekniskt arbeiði, brúkar orku uppá at finna fíggingarmynstur, sigur Bill Justinussen, nú Landsverk er komið við uppriti um fíggingarmynstur í samband við Eysturoyar- og Sandoyartunnlarnar.

- Landsstýrismenn hava fólk til slíkt arbeiði og hatta er annars uppgávan hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum, sigur eysturoyartingmaðurin.

- Hatta er ein politiskur spuningur, sigur Bill Justinussen avgjørdur.

- Ein fær illgruna um, at tey á Landsverk sita og gera sær politiskar metingar um, hvussu tingini skulu gerast. Men tað er ikki teirra uppgáva. Tað hava vit tey fólkavaldu, tingfólkini, til at taka sær av, og har er ein samtykt gjørd um, hvuusu farast skal fram, vísir Bill Justinussen á.

- Landsverk skal ikki koyra grús í maskinuna, fyri at siga tað soleiðis, sigur Bill Justinussen.



*- Eg skilji als ikki, at Landsverk, sum skal gera ymiskt tekniskt arbeiði, brúkar orku uppá at finna fíggingarmynstur, sigur Bill Justinussen, nú Landsverk er komið við uppriti um fíggingarmynstur í samband við Eysturoyar- og Sandoyartunnlarnar*